"innrásin":

# havnalagið í Lerwick



*Ein partur av føroysku "innrásini". Dirvi, áræði og ævintýrhugur er felagsnevnarin fyri hesa ferð*
Mynd: Jens Kr. Vang



*Vit høvdu føroyskt veðurlag á ferðini í Hetlandi. Viðhvørt regnaði, og viðhvørt skein sólin. Hetta er ein av teimum góðu løtunum*
Mynd: Vilmund Jacobsen

hvat teir ynsktu sær. Jú, teir ynsktu sær okkurt heitt. Vit kókaðu teimum seyðarhøvd og epli, sum teir fingu, tá ið vit komu til teirra. Menninir vóru troyttir, men vístu seg annars at vera hampiliga væl fyri – og báturin bar seg væl í sjónum. Vit bjóðaðu teimum sleip, men teir søgdu nei. Síðan fóru vit frá teimum – ikki við so góðum tannabiti.

Hesin sami seksæringurin úr Suðuroy hevði tikið ein av bátsfeløgunum upp á Suðuroyarbankanum ávegis til Hetlands. Hesin siglir við Smaragd. Túrurin var lokin, og nú hevði maðurin hug at koma við til Hetlands. Men tað var ikki bara sum at siga tað at taka mann av skipi á opnum havi.

Hetta eydnaðist og kvøldið, vit møttu honum í gongugøtuni, var hann ikki í iva um, at hann hevði tikið røttu avgerðina, tá ið hann hevði biðið suðuroyingarnar taka seg upp á Suðuroyarbankanum.

Í komandi parti um hetlandsferðina venda vit nøsini heimaftur og fara at siga frá, hvussu heimferðin gekk.




*Tá ið siglarar hittast, spyr eingin eftir, hvør er prestur, lækni, løgfrøðingur, fiskimaður ella vanligur arbeiðsmaður. Øll eru í "sama" báti*
Mynd: Vilmund Jacobsen



*Jóhanna setti eisini sín dám á føroysku "innrásina" í Hetlandi*
Mynd: Vilmund Jacobsen